# Kunngerðablaðið A

2011 Hefti 16

ISSN 0907-905X


Nr. 41

23. mai 2011

**Kunngerð um broyting í kunngerð um treytir fyri avreiðing í Føroyum og uttanlands**

**§ 1**

Í kunngerð nr. 95 frá 27. juni 2005 um treytir fyri avreiðing í Føroyum og uttanlands, sum seinast broytt við kunngerð nr. 114 frá 13. desember 2010, verður § 3a, stk. 2 orðað soleiðis:

„*Stk. 2.* Fram til 1. september 2011 er uppboðssølukravið ikki galdandi fyri hýsu.“

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Fiskimálaráðið, 23. mai 2011

**Johan Dahl (sign.)**
landsstýrismaður

/ Rógvi Reinert (sign.)

Nr. 42 23. mai 2011

# Kunngerð um veiðu eftir botnfiski við fiskiførum undir føroyskum flaggi í grønlendskum sjógvi í 2011

Við heimild í § 9, stk. 1, nr. 2 og 3 og § 40, stk. 2 og 3 í løgtingslóg nr. 28 frá 10. mars 1994 um vinnuligan fiskiskap verður ásett:

*Virkisøki*

**§ 1.** Kunngerðin fevnir um fiskiskap við fiskiførum undir føroyskum flaggi eftir botnfiski í búskaparøkinum hjá Grønlandi (ICES økini Va, XII, XIV og NAFO-undirøki 1) í 2011 sambært fiskiveiðiavtaluni millum Føroyar og Grønland.

*Heildarkvotur*

**§ 2.** Fiskifør undir føroyskum flaggi kunnu í 2011 fiska tosk, brosmu og steinbít í Eysturgrønlandi. Veiðan av toski má ikki fara upp um 255 tons, meðan hjáveiðan av svartkalva og kalva kann verða upp til 275 tons.
*Stk. 2.* Fiskifør undir føroyskum flaggi kunnu í 2011 fiska 100 tons av svartkalva í Vesturgrønlandi.

*Fiskiloyvi*

**§ 3.** Fiskiskapur eftir botnfiski í grønlendskum sjógvi kann bert fara fram við fiskiførum, sum eftir skrivligari umsókn hava fingið fiskiloyvi frá Fiskimálaráðnum til slíkan fiskiskap.
*Stk. 2.* Í fiskiloyvið verða settar nærri treytir fyri fiskiskapin um regluligar fráboðanir o.a. sambært § 11, stk.1 í lógini.

**§ 4.** Fiskiloyvi sambært § 3 til fiskiskap í Eysturgrønlandi verða latin eigarum av trimum fiskiførum undir føroyskum flaggi, sum hava fiskiloyvi til botnfisk í føroyskum sjógvi, og sum í tíðarskeiðinum 2006-2010 hava fiskað mest av botnfiskakvotunum í Eysturgrønlandi sambært fiskiveiðiavtaluni millum Føroyar og Grønland.
*Stk. 2.* Um fleiri enn tríggjar umsóknir kunnu javnsetast eftir treytunum í stk.1, verður avgerð tikin við lutakasti.
*Stk. 3.* Rættindi at fiska í Eysturgrønlandi verða latin fiskiførum sum felags árskvota.

**§ 5.** Fiskiloyvi sambært § 3 til fiskiskap í Vesturgrønlandi verður latið eigara av fiskifari undir føroyskum flaggi, sum hevur fiskað svartkalva í Vesturgrønlandi sambært fiskiveiðiavtaluni millum Føroyar og Grønland í tíðarskeiðinum 2006-2010.
*Stk. 2.* Um fleiri umsóknir kunnu javnsetast eftir treytini í stk.1, verður avgerð tikin við lutakasti.
*Stk. 3.* Rættindi at fiska í Vesturgrønlandi verða latin fiskiførum sum felags árskvota.

**§ 6.** Um eigari av fiskifari, sum hevur fingið tilsøgn um fiskiloyvi sambært § 4 ikki hevur gagnnýtt fiskiloyvið innan 1. oktober 2011, og útlit ikki eru fyri, at kvoturnar verða fiskaðar, kunnu loyvi verða latin øðrum umsøkjara.

*Sýni*

**§ 7.** Fiskifør, ið fiska sambært hesi kunngerð, kunnu verða áløgd at taka sýni av veiðuni at lata rannsóknarstovum.

*Revsing*

**§ 8.** Brot á § 3 verða revsað við bót, um ikki harðari revsing er ásett eftir aðrari lóg. Á sama hátt verður tann revsaður, sum ikki ger eftir boðum sambært § 7. Um brot er framt av partafelag, smápartafelag, lutafelag ella líknandi, kann felagið sum slíkt, sambært § 40, stk. 3 í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap, verða revsað við bót.

*Gildistíð*

**§ 9.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og fer úr gildi 31. desember 2011.

Fiskimálaráðið, 23. mai 2011

**Johan Dahl (sign.)**
landsstýrismaður

/ Rógvi Reinert (sign.)

## Kunngerð um broyting í kunngerð um trolveiði innan fyri 12 fjórðingar

### § 1

Í kunngerð nr. 65 frá 3. juni 2010 um trolveiði innan fyri 12 fjórðingar verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 2 verður orðað soleiðis:

„**§ 2.** Leiðirnar, sum eru umfataðar av hesi kunngerð, og tíðarskeiðini, tá tað er loyvt at fiska á teimum, eru tær í stk. 2-12 nevndu leiðir og tíðarskeið.

*Stk. 2.* **Øki A2:** Í tíðarskeiðinum frá 24. mai til 17. juli, báðir dagar íroknaðir, og frá 1. august til 7. september, báðir dagar íroknaðir, innan fyri linjur drignar millum hesi støð og í hesi raðfylgju:

1) 62°20’30” N 05°48’30” W
2) 62°11’00” N 05°51’50” W
3) 62°11’00” N 06°07’30” W
4) 62°20’30” N 06°01’00” W
5) 62°20’30” N 05°48’30” W

Linjan úr 1. staði í 2. stað verður drigin eftir 12 fjórðinga markinum.

*Stk. 3.* **Øki A1:** Í tíðarskeiðinum frá 1. juni til 17. juli, báðir dagar íroknaðir, og frá 1. august til 7. september, báðir dagar íroknaðir, innan fyri linjur drignar millum hesi støð og í hesi raðfylgju:

1) 62°20’30” N 06°01’00” W
2) 62°11’00” N 06°07’30” W
3) 62°11’00” N 06°11’30” W
4) 62°20’30” N 06°05’00” W
5) 62°20’30” N 06°01’00” W

*Stk. 4.* **Øki B:** Í tíðarskeiðinum frá 24. mai til 17. juli, báðir dagar íroknaðir, og frá 1. august til 7. september, báðir dagar íroknaðir, innan fyri linjur drignar millum hesi støð og í hesi raðfylgju:

1) 62°11’00” N 05°51’50” W
2) 61°48’10” N 06°01’40” W
3) 61°53’50” N 06°24’30” W
4) 61°58’20” N 06°22’00” W
5) 62°02’50” N 06°26’30” W
6) 62°11’00” N 06°07’30” W
7) 62°11’00” N 05°51’50” W

Linjan úr 1. staði í 2. stað verður drigin eftir 12 fjórðinga markinum.

*Stk. 5.* **Øki C**: Í tíðarskeiðinum frá 1. juni til 17. juli, báðir dagar íroknaðir, innan fyri linjur drignar millum hesi støð og í hesi raðfylgju:

1) 61°48’10” N 06°01’40” W
2) 61°42’00” N 06°04’15” W
3) 61°47’30” N 06°27’45” W
4) 61°53’50” N 06°24’30” W
5) 61°48’10” N 06°01’40” W

Linjan úr 1. staði í 2. stað verður drigin eftir 12 fjórðinga markinum.

*Stk. 6.* **Øki D**: Í tíðarskeiðinum frá 24. mai til 17. juli, báðir dagar íroknaðir, og frá 1. august til 7. september, báðir dagar íroknaðir, innan fyri linjur drignar millum hesi støð og í hesi raðfylgju:

1) 61°14’40” N 07°02’20” W
2) 61°29’10” N 07°22’30” W
3) 61°33’50” N 07°10’40” W
4) 61°26’30” N 07°03’30” W
5) 61°25’10” N 07°07’00” W
6) 61°18’00” N 06°54’30” W
7) 61°14’40” N 07°02’20” W

Linjan úr 1. staði í 2. stað verður drigin eftir 12 fjórðinga markinum.

*Stk. 7.* **Øki E:** Í tíðarskeiðinum frá 24. mai til 17. juli, báðir dagar íroknaðir, og frá 1. august til 7. september, báðir dagar íroknaðir, innan fyri linjur drignar millum hesi støð og í hesi raðfylgju:

1) 61°29’10” N 07°22’30” W
2) 61°32’40” N 07°27’00” W
3) 61°37’20” N 07°15’10” W
4) 61°34’50” N 07°08’10” W
5) 61°29’10” N 07°22’30” W

Linjan úr 1. staði í 2. stað verður drigin eftir 12 fjórðinga markinum.

*Stk. 8.* **Øki F:** Í tíðarskeiðinum frá 1. juni til 8. juli, báðir dagar íroknaðir, innan fyri linjur drignar millum hesi støð og í hesi raðfylgju:

1) 61°32’40” N 07°27’00” W
2) 61°39’00” N 07°35’40” W
3) 61°48’30” N 07°12’15” W
4) 61°37’20” N 07°15’10” W
5) 61°32’40” N 07°27’00” W

Linjan úr 1. staði í 2. stað verður drigin eftir 12 fjórðinga markinum.

*Stk. 9.* **Øki G:** Í tíðarskeiðinum frá 24. mai til 17. juli, báðir dagar íroknaðir, og frá 1. august til 7. september, báðir dagar íroknaðir, innan fyri linjur drignar millum hesi støð og í hesi raðfylgju:

1) 61°45’40” N 07°19’20” W
2) 61°57’30” N 07°35’20” W
3) 62°00’00” N 07°29’00” W
4) 61°58’00” N 07°21’00” W
5) 61°48’30” N 07°12’15” W
6) 61°45’40” N 07°19’20” W

*Stk. 10.* **Øki H**: Í tíðarskeiðinum frá 1. juni til 1. juli, báðir dagar íroknaðir, innan fyri linjur drignar millum hesi støð og í hesi raðfylgju:

1) 62°31’00” N 07°12’30” W
2) 62°33’20” N 06°58’30” W
3) 62°26’30” N 06°58’30” W
4) 62°24’30” N 07°12’30” W
5) 62°31’00” N 07°12’30” W

Linjan úr 1. staði í 2. stað verður drigin eftir 12 fjórðinga markinum.

*Stk. 11.* **Øki I**: Í tíðarskeiðinum frá 24. mai til 17.

juli, báðir dagar íroknaðir, og frá 1. august til 7. september, báðir dagar íroknaðir, innan fyri linjur drignar millum hesi støð og í hesi raðfylgju:
1) 62°33’20” N 06°58’30” W
2) 62°35’40” N 06°33’30” W
3) 62°29’40” N 06°33’30” W
4) 62°26’30” N 06°58’30” W
5) 62°33’20” N 06°58’30” W
Linjan úr 1. staði í 2. stað verður drigin eftir 12 fjórðinga markinum.
*Stk. 12.* **Øki J**: Í tíðarskeiðinum frá 24. mai til 17. juli, báðir dagar íroknaðir, og frá 1. august til 7. september, báðir dagar íroknaðir, innan fyri linjur drignar millum hesi støð og í hesi raðfylgju:
1) 62°35’40” N 06°33’30” W
2) 62°20’30” N 05°48’30” W
3) 62°20’30” N 06°01’00” W
4) 62°25’50” N 06°05’00” W
5) 62°29’40” N 06°33’30” W
6) 62°35’40” N 06°33’30” W
Linjan úr 1. staði í 2. stað verður drigin eftir 12 fjórðinga markinum.“

2) § 5 verður orðað soleiðis:
„**§ 5.** Hjáveiðan av toski og hýsu skal hvønn túr sær ikki fara upp um 35% tilsamans av vektini av veiðinøgdini av samlaðu veiðini.”

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi 24. mai 2011.

Fiskimálaráðið, 24. mai 2011

**Johan Dahl (sign.)**
landsstýrismaður

/ Rógvi Reinert (sign.)

FØROYAPRENT · Svanamerktur prentlutur 541 705